

Stangabrúgvin var full av fólki, tá Bjørn Kalsø setti Sjómannadagin 2007. Upp ímóti 7000 fólk vitjaðu tiltøkini í Klaksvík, og alt gekk fyrimyndarliga fyri seg, sum eitt familjutiltak skal gera, sigur ein av fyriskiparunum, Karl Birgir Isaksen

# Besti egnarin funnin

**21 ára gamli Ólavur Jacobsen úr Klaksvík gjørdist nýggjur føroyameistari í egning á Sjómannadegnum leygardagin**

SJÓMANNADAGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Fyrstu ferð, hann luttók í Føroyameistarakappingini í egning var á fyrsta Sjómannadegnum í 2005. Tá bleiv Ólavur Jacobsen úr Klaksvík aftastur. Í fjør royndi hann seg so aftur og náddi tá upp á eitt sætta pláss.

## Uppreisn

Men í ár skuldi tað so umsíðir eydnast. Seinnapartin leygardagin tryggjaði 21 ára gamli Ólavur Jacobsen sær fyrsta plássið og harvið føroyameistaraheitið í egning. Honum á baki komu Martin Simonsen og John Havn, báðir úr Klaksvík.

Ólavur Jacobsen var ikki sørt ovfarin av sigrinum, tí hann helt seg vita, hvat hann kundi vænta sær.

- John, Martin og eg plaga altíð at kappast um, hvør egnir skjótast, og eg tapi næstan altíð, sigur Ólavur Jacobsen, sum nú rættiliga fekk uppreisn.

## Styrkivenjing hjálpti

Ólavur Jacobsen hevur verið fastur egnari hjá Kallanesi í mong ár. Men síðani hann fór í læru sum húsasmiður fyri nøkrum mánaðum síðani, hevur hann stórt sæð ikki egnt.

- So eg eri ikki í serliga góðari venjing í so máta. Tað skal tó sigast, at eg havi styrkivant rættiliga nógv seinastu tíðina, og tað hevur givið úrslit. Eg eri betri fyri kropsliga í allar mátar og eri nokk eisini blivin meir fimur, heldur Ólavur Jacobsen.

Nýggi føroyameistarin í egning viðgongur, at honum dámar stak væl at kappast. Føroyameistaraheitið gav honum pláss á eini stórari egnikapping í Íslandi næsta ár, og Ólavur Jacobsen er fúsur at fara avstað. Harumframt fekk hann eina peningagávu á 5000 kr.

Úrslitið leygardagin hevði sostatt við sær, at tað ikki eydnaðist tvífaldaða føroyameistaranum í egning, John Havn, at endurvinna heitið á triðja sinni. John Havn endaði á triðja plássi, meðan Martin Simonsen gjørdist nummar tvey.

Teir tríggir egnararnir fingu allir steyp til ognar.



*Nýggi føroyameistarin í egning helt, at tað mundi vera styrkivenjingin, sum var komin honum til góðar í kappingini í ár*

# ...ørnini

fríggjakvøldið, og leygardagin sluppu tey aftur upp í leikin. Um middagsleitið fóru menn úr grindafelagnum nevniliga at skera upp tveir grindahvalir, meðan teir greiddu frá, hvussu hetta eigur at gerast, og hvussu tað ymska á grindhvali eitur.



*Føroyameistarakappingin í egning var aftur í ár eitt av stóru hæddarpunktunum á Sjómannadegnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*